


# Lucia merkir ljós

**Orðið »lucia« kemur av latínska orðinum »lux«, sum merkir ljós. Lucia (283-304) var ein italsk halgikvinna, sum leið martýr-deyðan fyri meiri enn 1700 árum síðani, meðan Diocletianus keisari ráddi fyri borgum.**

Snorri Brend

Halgidagur hennara er 13. desember - tað er: komandi mánadag - sum í gamla julianska kalendaranum var ársins stytsti dagur.

Siðurin við Lucia-gongd er nýggjur, og stavar frá 1928, har eitt svenskt blað kjósaði Stockholms Luciu. Í dag hevur hvør einasti svenski býur soleiðis sína egnu Luciu, sum verður funnin í eini kapping.

Við hesa kappingina er møguleiki at gerast svensk Lucia, sum hevur tvær merkingar: At ein sleppur í kortesju til Skansan í Stockholm, men eisini sleppur til Italien og Syrakus á Sicilien, haðani tann upprunaliga Lucia var ættað.

Lucia hevur kortini ikki nakað við jól at gera, sum ein eisini kann staðfesta í talinum av sangum í hesum sambandi. Sviar hinvegin hava eitt stórt tal av Lucia-sangum, meðan vit her á landi bert kenna til tann eina sangin, sum her verður prentaður í einari týðing:

*Køvandi svørt er nátt*
*lurta, hoyr sangin*
*missir tú mál og mátt*
*ljóð sum av veingjum*
*tá inn um húsagátt*
*stígur á hesi nátt*
*Sankta Lusia, Sankta Lusia.*

*Náttin, hon líður kvirt*
*stilli um tún og garð*
*alt liggur deytt og myrkt*
*skuggar um djúpan dal*
*tá inn um dyrnar vár*
*stígur við ljós í hár*
*Sankta Lusia, Sankta Lusia.*

*Veturin langur er*
*fjalir øll somul*
*myrkri tá valdar her*
*ung og øll gomul*
*men til vár miðum stað*
*kemur hon ljós og glað*
*Sankta Lusia, Sankta Lusia.*

